TIL **ARBEIÐIS**



*Guðrið Poulsen arbeiðir í hesum døgum uppá smá sushi-íløt*

**MYND:** JENS KRISTIAN VANG

# HEVUR ALLAR **SLÚSURNAR** FRÁ

– TÁ IÐ EG HEVÐI TIKIÐ PRÓGV Í **HOYDØLUM**, VISTI EG, AT EG SKULDI LÆRA OKKURT SKAPANDI. TÁ EG SO Í **FINNLANDI** KOM AT ARBEIÐA VIÐ **KERAMIKKI**, VISTI EG, AT LEIR HÓSKAÐI TIL MÍN, SIGUR GUÐRUN POULSEN, SUM NÚ Í **23 ÁR** HEVUR HAVT SÍN EGNA KERAMIKKVERKSTAÐ, **LEIRLIST** Í HAVN



**TIL ARBEIÐIS**

**Randi Jacobsen**
randi@sosialurin.fo

Í arbeiðshølum sínum í Sjurðargøtu í Havn situr keramikarin Guðrið Poulsen og dreygar henda morgunin.

- Beint nú geri eg nøkur sushisett, og eg ætli at gera seks smáar skálir í hvørjum liti, sigur Guðrið Poulsen.

Fyri at fáa skálirnar líka stórar hevur hon vigað leirið av, 100 gramm til hvørja skál.

Beint nú er nokkso friðarligt, og tað hevur altíð verið upp og niður við eftirspurninginum og uppgávunum, sigur hon.

Í 1982 tók Guðrið Poulsen prógv í Hoydølum, og hon var tá longu greið yvir, at hon vildi læra listahandverk, vildi gera okkurt skapandi arbeiði.

– Tá vóru Føroyar eitt oyðimarkarland í so máta, so eg fór til Finnlands á ein skúla.

Á skúlanum fekk hon høvi at royna ymiskt, silvurarbeiði, kopar, og dreyga. Men tá ið hon slapp at arbeiða á einum keramikkverkstaði, var hon greið yvir, at leir var nakað, hon hevði hug til at arbeiða við restina av lívinum. Í Finnlandi vórðu eygu hennara latin upp fyri tí skapandi arbeiðinum.

– Leirarbeiði hóskaði so væl til mítt sinnalag.

## Lærdi í Íslandi

Úr Finnlandi fór Guðrið Poulsen til Íslands, har hon tók eina tvey ára útbúgving.

Í 1987 læt hon sín egna keramikkverkstað upp í Sjúrðargøtu í Havn, Leirlist, og har hevur hon nú í 23 ár sitið og skapað listaverk og brúkslist úr leiri.

Hon situr har púra still og dreygar smáar nettar lutir, men hon hevur eisini fleiri ferðir skapt størri list, sum stendur uttandura.

Eingin spinnir gull sum listafólk í Føroyum, men hóast inntøkan stundum er lítil, hevur Gurðið Poulsen altíð livað eftir tí meginreglu, at hon ikki skuldi fáa sær annað starv við síðuna av.

## Vil ikki hava fast arbeiði

– Men eingin hevur lisið so nógvar starvslýsingar sum eg. Eina ferð mundi eg søkt, men eg slepti ætlanini, tí eg egni meg ikki til fast arbeiði. Freelance-uppgávur kann eg átaka mær, og eg arbeiði eisini sum freelance á háskúlanum, sigur Guðrið Poulsen.

Hetta hevði tó ikki á nakran hátt borið til, um hon ikki fekk so góðan stuðul heimanifrá. Maðurin bakkar hana fult út upp, at hon burturav skal arbeiða við síni list.

## Er heppin

Guðrið Poulsen takkar einum vinmanni, sum er rækjuskipari, fyri, at hon kann seta orð á, hvat tað besta er við arbeiði hennara.

– Eg havi alla tíðina slúsurnar opnar. Øll hava okkurt skapandi í sær, og eg eri so heppin, at eg sleppi at arbeiða við øllum kranunum frá, sigur Guðrið Poulsen.

Hon flennir eftir tí øvugta í, at listafólk ofta tosa um pengar.

– Vit, sum eru so idealistisk og ikki vilja hugsa um tað materiella, eru tey ringastu at tosa um pengar, ið vit hava so lítið av.

Í øðrum londum er vanligt, at keramikarar arbeiða saman, men Guðrið kundi ikki hugsað sær tað, sjálvt um hon onkuntíð saknar starvsfelagar. Hon samstarvar tó við onnur um størri verk.

Í arbeiðshølum sínum hevur hon sína sølubúð, men har er ikki tann nógva ferðslan. Tey vitjandi eru mest føroyingar, sum hava alsk og eyga fyri føroyskari leirlist. Útisetar vitja eisini. Fremmand ferðafólk koma ikki á gátt. Annars selur hon verk síni í Norðurlandahusinum og á Kunningarstovuni í Havn.

## Gott við starvsløn

Guðrið Poulsen er fegin um skipanina við starvsløn fyri listafólk. Eina ferð fekk hon starvsløn í tveir mánaðir, eina aðru ferð í tríggjar mánaðir.

– Tað ger, at vit tora at fara undir at gera verk, sum kanska ikki selja so væl, men royndirnar siga eisini fólki, at vit kunnu gera annað, sigur Guðrið Poulsen.

### FAKTA **GUÐRIÐ POULSEN**

**Starv:** *Keramikari*
**Besta við starvinum:** *At skapa*
**Ringasta við starvinum:** *Lítil inntøka*
**Starvstíð:** *23 ár*
**Lívsstarv:** *Ja*
**Starvsfólk:** *Sjálvstøðug*
**Staður:** *Tórshavn*